Skaðagrindin í Sandvík í 1915
- eitt uppískoyti



Johs. Andr. Næs

Í blaðnum »Birting« í 2004 hevði eg eina frágreiðing um tann sorgartilburðin, sum fór fram í grindini í Sandvík í 1915. Seinast í frágreiðingini viðmerkti eg, at eingin ivi var um, at fleiri søgur og upplýsingar mundu finnast millum fólk, men sum eg einki visti um. Eg segði meg tí gleðan taka við fleiri frásøgnum og upplýsingum og eisini rættingum, har eg møguliga hevði mistikið meg og misskilt eitthvørt. Og rætt var. Her er eitthvørt at koma umaftur við, og tí komi eg við hesum uppískoytinum. Av tí, at »Birting« kemur ikki út í ár, verður hetta uppískoytið prentað í Dimmalætting og í Sosialinum.

Sandvíksfjørður

Mynd: Áki Bertholdsen

Mistøk

Jóan Jacob og Elias: Fyrst er tað mistakið at rætta, at undir myndunum av brøðrunum Joen Jacobi og Eliasi Petersen skal teksturin skiftast um. Tað er Elias, sum er hattleysur, og Joen Jacob er í kolli (keppi).

Hans Pauli Poulsen: Eitt annað mistak í frágreiðingini er, at maðurin, sum fann grindina, æt ikki Hans Pauli Johannesen, men Hans Pauli Poulsen - Hans Pauli hjá Ninna.

Danjal Pauli og fjallstavurin

Um Danjal Paula Holm er at siga, at hann henda morgunin var farin til Fámjin at vitja gentu sína, áðrenn grindaboðini komu til Hvalbiar. Á Hvalbiarfjalli frættir hann frá trongisvágsingum, sum hann møtir, og sum koma rennandi norðureftir, at grind er í Sandvík. Danjal Pauli vendir við aftur og fer við trongisvágsingum at renna til Sandvíkar í grind.

Í Hvalba koma teir í fylgi við Mortani Holm á Fløttinum, sum eisini var á veg til Sandvíkar. Danjal Pauli fer beina leið til Sandvíkar við fjallstavinum, sum hann hevði havt á veg til Fámjin, í hond. Foreldrini á Heyggi, Mortan og Elspa, vistu tí av ongum, at hann var farin í grind í Sandvík, fyrr enn seinni. Tá ið teir koma í Oddan í Sandvík - tað er har inni oman fyri sandin - tá sigur Danjal Pauli við Mortan: »Mortan, eg seti stavin her, tú tekur hann við tær, tá ið tú fer heimaftur!« Hetta hugsaði Mortan einki meira um tá. Men tá ið hann fór heimaftur til Hvalbiar seinni um dagin eftir sorgartilburðin, har Danjal Pauli saman við svágrinum Joen Jacobi og øllum hinum tólv var sundaður, tá runnu orðini hjá Danjal Paula fram fyri hann; hann var illa við og undraðist so sáran. Stavin tók hann heimaftur við um Eggina og bar foreldrunum hjá Danjal Paula hann. Dóttir Mortan á Fløttinum, Ása Enni, sigur, at faðir sín hevði hetta fleiri ferðir á orði seinni í lívinum, og hann undraðist á, hví Danjal Pauli hevði sagt soleiðis.

Bátarnir

Um bátarnar upplýsir Suni Joensen í Tórshavn - hann er ættaður úr Sandvík - at Ørnin var sami bátur, sum Kollan. Tað vóru summir, sum nevndu - eyknevndu - bátin Kolluna. Suni Joensen veit eisini at siga, at seksmannafarið Ritan var eisini við í drápinum, og at Niclas hjá Elini hevði sum gamal maður sagt Suna frá, at hann var við Rituni. Niclas hevði eisini sagt frá, at teir báðir menninir, sum tóku Petur í Køkini, sum við yvirmátti og í ørviti sat og helt sær á kjølinum á Falkinum, vóru: Jóan Jacob Olsen - bóndin Uttan Ánna - og Rasmus Nielsen - Rasmus á Stykkinum.

Lógvin í Sandvík

Í fyrstu grind, sum kom á Sandvík eftir skaðagrindina - tað var 23. desember í 1939 - tá varð avrátt, at kønir menn í Sandvík skuldu vera á innastu bátunum undir drápinum. Heitt var tí á skilamannin Hans Paula hjá Ninna - hann, sum fyrstur hevði sæð grindina í 1915 - um at vera innastur nú í 1939 undir drápinum. Men so lúnsk er lógvin, at sjálvt um alt fyrivarni varð tikið - og ódnarveður var ikki, hóast væl av vindi var, og lógvin breyt - so tók eitt brot bátin, ið Hans Pauli hjá Ninna var á, so at hann skjeyts eftir lið hálvfullur av sjógv inn á sandin, men báturin hólvdist ikki, og eingin mannskaði varð.

Stormgrindin

Nevnt var í frágreiðingini, at árið eftir í Stormgrindini í Hvalba 28. november í 1916 gekk Petur í Køkini á Hvalbiarsandi - Skálasandi - og var ikki í báti, tí konan vildi ikki, at hann skuldi fara í bát. Hann helt tá sum so mangur, at grindin fór at gera landgongd á Hvalbiarsandi. Í frágreiðingini varð sagt, at grindin doyði á Hvalbiarsandi, men hetta er eitt mistak. Hon legði beinini á Lítlibøsandi.

Men seinast í drápinum í Stormgrindini var Petur kortini farin í bát úti í Nesi. Jú, grindamaður var hann, og mansevni var í Petur í Køkini.

Lítlibøsandur - Nessandur -. Vatnið er stutt oman fyri sandin

Áki Bertholdsen

Nú Stormgrindin er nevnd, fari eg í hesum sambandi at nevna eina søgu um, hvussu miklan týdning staðkendir og skynsamir skilamenn kunna hava og hava havt - eisini í grindadrápi

Bróðir mín Danjal Petur - nevndur Allin - veit at siga frá abba konu síni, Niclasi Uppi í Garði, at tá ið Stormgrindin doyði í 1916 á Lítlibøsandi, eisini nevndur Nessandur, var av ringasta stormi av útsynningi, og sum tá altíð á hesi ættini var mikið glaðustrok í Kjógvavatni inni í Dalinum - oftast nevnt Vatnið - og út av Lítlibøsandi.

Niels Pauli í Geil var grindaformaður. Niclas Uppi í Garði var altíð í grindabáti saman við Niels Paula.

Tá ið Niels Pauli heldur, at grindin er komin nóg langt inn, sigur hann: »Stikk Niclas!« Niclas svarar: »Eg stingi ikki, fyrr enn næsta glaðan kemur í Vatnið!« Hann segði hetta av tí, at gamalt er, at grind gongur altíð á vindin. Og so var eisini hesa ferð. Niclas stakk, tá ið hann sá næstu glaðu í Vatninum, og tá stungu hinir bátarnir eisini. Grindin gekk á glaðustrokið, og øll grindin - 127 hvalir - gjørdi landgongd og legði beinini á Nessandi.

Til stuttleika kann verða nevnt í hesum sambandi, at frá gamlari tíð hava hesar báðar sandstrendurnar í Hvalba havt høvuðsheitini Hvalbiarsandur og Lítlibøsandur. Men ofta verður Lítlibøsandur nevndur Nessandur, tí at hann liggur í býlinginum í Nesi, sum eisini í gomlum døgum hevur verið nevndur Lítlibøur.

Hvalbiarsandur, sum liggur millum býlingarnar í Skálum og við Neyst, er deildur í tvíningar við ánni, sum har hevur runnið í allar tíðir oman á sjógv. Tann parturin, sum er nærri býlinginum við Neyst, verður ofta nevndur Neystasandur, og tann parturin, sum er nærri býlinginum í Skálum, verður nevndur Skálasandur. Hesi nøvnini eru sjálvandi komin fram, tá ið meira nágreinliga skal verða nevnt tað, ið verður umrøtt, til dømis tá ið hvalirnir liggja á Skálasandi ella á Neystasandi, tá ið farið verður at skera upp.

Jenis á Hamri

Heimi í Stovu

Mynd: Steingrím Niclasen